gult8 cyan8 magenta8 svart8



# Kommunur bróta dagstovnalógina

**– Tá ið dagstovnar verða settir á stovn uttan at leiðsluviðurskiftini eru í lagi, kunnu vit seta spurnartekin við trygdina og hvør hevur dagligu ábyrgdina, sum dagstovnalógin fyriskrivar. Og tá ið hesi viðurskifti ikki eru í lagi, kunnu vit spyrja, um onnur krøv verða fylgd, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag**

*Turið Kjølbro*



*– Vit fegnast um, at síðani nýggja dagstovnalógin kom, eru nógvir nýggir stovnar komnir, stovnar sum eru góðkendir viðvíkjandi øllum krøvum, sum verða sett. Samstundis royna kommunur eisini við bíligum loysnum, sum ikki fylgja lógini og tað er ógvuliga óheppið, sigur Carita Björklund*

*Savnsmynd*

Áðrenn kommunurnar 1. juli í fjør yvirtóku dagstovnaøkið, skuldu allir barnagarðar sambært lóg góðkennast á hægsta stað, nevniliga í Almanna- og heilsumálastýrinum. Í dag eru tað tær einstøku kommunurnar, sum skulu góðkenna stovnarnar, ið eru í teirra egnu kommunu sambært nýggju dagstovnalógini. Henda lógin setir kortini krøv og treytir eins og tann gamla til karmar, innihald og mannagongdir, sum stovnarnir skulu lúka. Men hetta lítla árið síðani kommunurnar yvirtóku økið ber til at vísa á kommunur, sum ikki fylgja lógini og sum stovna og skipa dagstovnar uttan at lýsa størv leys og sum ikki seta leiðara. Meðan dagstovnalógin var í umbúna og til viðgerðar á tingi, setti forkvinnan í Føroya Pedagogfelag, Carita Björklund, spurnartekin við, í hvønn mun kommunurnar fóru at fylgja lógini og hon bar ótta fyri, at vit fóru at fáa ymiskar stovnar við ymiskum innihaldi.

– Dagstovnalógin er nóg góð. Í henni stendur bæði, hvussu arbeiðast skal, mannagongdir, normeringslykil og so framvegis. Lógin er gjørd við tí fyri eyga at tryggja børn, foreldur og starvsfólk. Men tíverri síggja vit í dag, at fleiri kommunur ikki fylgja lógini, og ivaleyst hendir ymiskt vit ikki eru vitandi um, sigur Carita Björklund.

Her sipar Carita Björklund serliga til útibarnagarðar, sum er vorðin ein væl umtókt loysn nógvar kommunur velja, tí útibarnagarðar eru bíligir í rakstri og skjótir at seta í verk.

– Vit síggja, at útibarnagarðar verða settir á stovn eitt nú í Tórshavnar kommunu uttan at leiðslan er í lagi, og vit vita, at hetta hendir aðra staðni eisini. Tað vanliga er og hevur altíð verið at søkja eftir leiðara og síðani eftir starvsfólkum, men nú síggja vit, at stovnar verða settir á stovn uttan at seta leiðara, og tá kunnu vit seta spurnartekin við trygdina og hvør hevur dagligu ábyrgdina, sum dagstovnalógin fyriskrivar. Og tá ið hesi viðurskifti ikki eru í lagi, kunnu vit spyrja, hvussu er við brunatrygd, arbeiðsumhvørvi, heilsu- og hølisviðurskiftum og øðrum, sigur Carita Björklund.

## Avleiðing av yvirtøku

At kommunurnar á henda hátt ganga uttan um lógina er ein avleiðing av, at kommunurnar hava yvirtikið dagstovnaøkið. Áðrenn kundi eingin stovnur lata upp áðrenn endaliga góðkenningin var komin frá Almanna- og heilsumálastýrinum.

– Vit mugu ganga út frá, at hesir stovnar, sum ganga uttan um tað sum lógin fyriskrivar, eru góðkendir av kommununi á staðnum.

Og tá ið kommunan skal hava eftirlit við egnum stovnum og samstundis er áhugað í at hava bíligar stovnar, kunnu vit spyrja, um hetta hongur saman. Samstundis vita vit, at smærru kommunurnar ikki hava umsiting til at røkja ábyrgdina nóg væl, og tí er tað ein stórur biti hjá nógvum at gloypa at yvirtaka eitt so stórt øki. Hinvegin fegnast vit um, at síðani nýggja dagstovnalógin kom, eru nógvir nýggir stovnar komnir, stovnar sum eru góðkendir viðvíkjandi øllum krøvum, sum verða sett. So tað ber til at stovna barnagarðar og halda seg til lógina, sigur Carita Björklund.

Endaliga eftirlitið við at dagstovnalógin verður hildin hevur Almanna- og heilsumálastýrið, og fær aðalstýrið at vita, at alt ikki er farið rætt fram, vendir tað sær til kommunurnar.

– Eftirlitið verður tí ógvuliga tilvildarligt, sigur Carita Björklund.

## Við í lógarsmíði

Føroya Pedagogfelag fylgir ógvuliga væl við, hvat hendir innan lógarsmíð, tá ið tað snýr seg um børn og viðurskifti hjá børnum. Ætlanin er at gera eina nýggja barnaforsorgarlóg, og innan hetta økið arbeiða eitt nú pedagogar innan serstovnaøkið.

– Málið hjá okkum er at koma í nevndina, ið fyrireikar lógarsmíðið, soleiðis at lógin verður so góð sum møguligt. Hetta royndu vit eisini, tá ið dagstovnalógin varð gjørd, men tað eydnaðist ikki. Í tí førinum var eingin serfrøðinganevnd sett, og tað ber lógin brá av. Eitt nú at dagrøktarlógin og dagstovnalógin vórðu tvinnaðar saman. Tað er ógvuliga óheppið, tí tað ber ongantíð til at seta somu krøv til eina dagrøkt sum til ein dagstovn. Annars eru vit ógvuliga fegin um at hava fingið eina góða dagstovnalóg og ikki minst, at hendan lógin, sum tryggjar børnini, varð gjørd samstundis sum kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið, sigur Carita Björklund.

# Felagið Tórshavn ársaðalfund

*Birita Andreasen*

– Árið hevur verið gott og spennadi, við framgongd og vøkstri á nærum øllum økjum.

Soleiðis ljóðar tað frá Felagnum Tórshavn, sum hevði ársaðalfund tann 25. februar.

Formaðurin í felagnum, Thordur Thorsteinsson, legði fram ársfrágreiðingina fyri 2000. Samanumdrigið so vísti úrslitið hjá felagnum og Kunningarstovuni, eitt samla avlop upp á knappar 24.000 kr.

Ferðavinnan er í menning, og tað merkist eisini hjá á Kunningarstovuni. Hetta sæst aftur bæði í roknskapinum eins og statistikkinum. Á Kunningarstovuni telja tey vitjanirnar, og teirra tøl vísa eina fitta hækking av viðskiftafólkið frá 1999 til 2000. Tá tað kemur til føroyingar, fevna teir um 41 posent av teimun vitjandi, sum er ein munandi vøkstur frá í fjør. Hetta heldur stjórin á Kunningarstovuni, Ingigerð á Trøðni, kemst av teimun mongu tiltøkunum sum eru í býnum. Eisini atgongumerkjasølan er hækka nógv.

Nevnast skal eisini, at ein nógv sakna Kunnigarstova lat upp á Sandi í 2000.

## Gongutúrar

Felagið Tórshavn skipar eisini fyri gongutúrum. Í 2000 vóru tilsamans gjørdir 37 túrar. Í miðal vóru 30 luttakarir til hvønn túrin, so tað má sigast at vera ein góð undirtøka. Fyrst í juli varð skipað fyri einum millenium túri úr Akrabyrgi í Enniberg. Hóast at veðrið ikki var av tí besta allan túrin, so vóru fólk stak væl nøgd við útferðina. Tað er longu avgjørt at skipa fyri einum líknandi túri komandi summar.

Felagið hevur tætt samstarv við handlarnar í miðbýnum, og hetta hevur eyðnast sera væl. Tiltøk sum Jól í Miðbýnum, mótasýningar, langir leygardagar og tónleikur í býnum er komin í eina fasta legu. Og hesi tiltøk draga eisini nógv fólk inn í býin.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Atlantis fyri á býráðsfundi



*Møguleiki verður at flagga fyri mentanarhúsinum Atlantis flaggdagin*

**Gongst alt sum ætlað verður ein endalig loysn á viðurskiftunum í Atlantis góðkend av Klaksvíkar býráði um tríggjar vikur**

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Mentanarhúsið Atlantis skal fyri á býráðsfundi í Klaksvík 24. apríl, og góðkennir býráðið loysnina, sum partarnir í málinum eru komnir fram til, kann húsið fara rættiliga í gongd aftur.

Mentanarnenvdin hjá Klaksvíkar býráði hevur arbeitt við málinum í nógvar mánaðir, og nú er komið so langt, at formaðurin í nevndini kann leggja málið fyri býráðið.

Síðani Atlantis var umbygt og lat upp aftur, hevur húsið bara riggað sum ætlað part av tíðini. Seinastu tíðina hevur lítið og einki virksemi – annað enn sjónleikur – verið í húsinum, og tað var ikki ætlanin.

Ein partur av trupulleikunum eru fíggjarligu viðurskiftini og møguleikarnir at reka húsið. Norðoya Sparikassi, Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Klaksvíkar kommuna eru høvuðsleikararnir í hesum leiki, og tey eru vorðin samd um eina loysn, sum skal fáa mentanarhúsið at virka aftur.

## Nýggja nevnd

Ætlanin fyri Atlantis er ikki almenn enn, men hon snýr seg um at gera húsið til ein sjálvsognarstovn við eini sjálvstøðugari nevnd.

Hendan nevndin skal síðani leggja virksemið í húsinum til rættis, og nevndin skal eisini avgera, um húsið skal hava dagligan leiðara. Hvussu umfatandi virksemið í húsinum kann verða, veldst millum annað um fíggjarligu karmarnar, sum húsið fær at virka undir.

Ætlanin er, at biografurin skal byrja aftur og mentanarlig tilboð av ymsum slagi skulu verða í húsinum.

Formaðurin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði, Jórun Høgnesen, sigur, at nevndin verður klár at leggja málið fyri býráðsfundin 24. apríl, og sostatt kann hol setast á eitt nýtt tíðarskeið í Atlantis flaggdagin.

# Varð hótt úr starvinum

PENSJÓNSMÁLIÐ
*John Johannessen*

Fyrrverandi stjórin á Almannastovuni, Maria Jacobsen, fekk valið ímillum at bróta lógina ella siga upp. Ti fór hon so skjótt úr starvinum sum stjóri á Almannastovuni.

Hetta veit Dimmalætting fyri í gjár at siga.

Dimmalætting skrivar, at tað var nógv umrødda pensjónsmálið, sum fekk aðalstýrið at geva Almannastovuni kravboð.

Fyrrverandi landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum vildi hava, at pensjónistar fingu meira útgoldið, eftir at tað vísti seg, at nýggja pensjónslógin gjørdi, at nakrir pensjónistar fingu minni útgoldið.

Tí varð álagt Almannastovuni at gjalda út eina skattafría upphædd til pensjónistarnar – eina viðbót. Hetta hevði Almannastovan ikki heimild til. Almannastjórin kundi ikki liva við at bróta lógina, og segði seg tí úr starvinum.

# Leggur ikki pensjónistar undir at snýta

AVSANNAN
*Stefan í Skorini*

Sosialurin bar í gjár tey tíðindi, at lógin um stuðul til heilivág varð misnýtt av pensjónistum. Í tí sambandi varð Petur Oluf Joensen, apotekari á Tjaldurs Apoteki í Havn, endurgivin fyri at siga, at tey á apotekinum hava meira at gera um ársfjórðingsskiftið.

Av tí at fleiri hava fingið ta fatan, at tað er Petur Oluf Joensen, sum leggur pensjónistar undir at misnýta stuðulin, vil Sosialurin sláa fast, at hetta er ikki so.

Petur Oluf Joensen avsannar sostatt, at hann sjálvur leggur nakran undir at misnýta stuðulin til heilivág.

Innihaldið og niðurstøðan í greinini eru hinvegin orð blaðsins.


Kom í form til summarið

Nýmótans útgerð

Nýtt skeið í Spinning
Frá 9. apríl til 15. juni

Tíðirnar verða:

Týsdag
15.00-16.00 Byrjarar
17.30-18.30 Vand
18.30-19.30 Byrjarar
19.30-20.30 Fatburner

Hósdag
18.30-19.30 Byrjarar
19.30-20.30 Fatburner

Leygardag
15.00-16.30 *Weekend burner

Tilmelding 7. apríl

Møguligar broytingar kunnu koma fyri

Kostnaður fyri alt skeiðið:
1x vikuna kr. 380,-
2x vikuna kr. 620,-
3x vikuna kr. 840,-
*Weekendburner 20 kr. eyka pr. ferð

Kostnaður pr. ferð:
1 ferð kr. 50,-
10 ferðir kr. 400,-
10 ferðir limir kr. 275,-

Upplatingartíðir:
má.-mik.-fr. kl. 12.00-21.00
týs. & hós. kl. 07.00-10.00
15.00-21.00
leygardag kl. 14.00-17.00

Frægd og Fimi
DJ. í Gellsgøta 5
100 Tórshavn
Tlf. 317100
e-mail: frægd@post.olivant.fo
heimasíða: frægd.olivant.fo

Tað besta tú kanst bjóða tær sjálvum